# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
NIELS PETERSEN
NIELS@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Altjóða góðkenning til Gundadal

**Í morgun klokkan 09:00 var ein tíðindafundur í FSF-húsinum í sambandi við, at Ovari Vøllur í Gundadali í Havn nú hevur fingið altjóða FIFA-góðkenning**

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Fjølmiðlarnir vóru allir til staðar, tá føroyski umboðsmaðurin hjá týsku fyritøkuni Polytan, Ásvald Simonsen, handaði Heðini Mortensen borgarstjóra í Havn prógvið fyri, at altjóða fótbóltssamgongan FIFA nú hevur góðkent undirlagið á Ovara Vølli til at spæla altjóða dystir á.

Talan er um eina sokallaðan FIFA two star-góðkenning, og tað merkir, at einki lið kann sýta fyri at spæla ein UEFA- ella FIFA-dyst á undirlagnum, tí tað er ítróttarliga fult í tráð við hvat annars verður mett til at vera forsvarligt, og kann javnmetast við at spæla á vanligum grasvølli.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, og Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, tóku ímóti FIFA-góðkenningini, og vóru teir sera fegnir um hetta slóðbrótandi stig innan føroyskan fótbólt.

## Fegin borgarstjóri

Heðin Mortensen fegnast um, at Gundadalur nú er komin á altjóða støði, eisini hvat graslíki viðvíkur. Hann sær stórar møguleikar í hesi góðkenning, bæði fyri at føroyskur fótbóltur kann hækka í støði, men eisini í útlendska áhuganum fyri at koma higar at spæla dystir ella venja.

- Eg eri sera fegin um, at vit her í høvuðsstaðnum kunnu vera slóðbrótarar, hvat góðum korum fyri fótbóltin viðvíkur, sigur Heðin Mortensen.

## Nýtslan

Ísak Mikladal væntar ikki, at landsliðini í fyrstu atløgu koma at spæla sínar dystir á graslíki, tó at Ovari Vøllur verður ein góð trygd at hava í bakhondini, um tað skuldi hent at tað ikki kann spælast á Tórsvølli ella Svangaskarði. Men FIFA-góðkenningin kemur at fáa nógv at tíða í sambandi við landsliðsvenjingar og í sambandi við dystirnar hjá teimum yngru landsliðunum. Eisini fær FSF nógv betri møguleikar fyri at skipa fyri altjóða kappingum, tí at fleiri dystir jú kunnu spælast sama dag á graslíki.

## Fyrstu altjóða dystirnar

Havnafeløgini B36 og HB, sum bæði skulu út í evropeiska kapping í summar, vóna at sleppa at spæla sínar heimadystir á Ovara vølli. Tí tað er undirlagið, sum leikararnir eru vanir við í teirra dagligu venjing og dystirnar í Formuladeildini. Uppgávan hjá feløgunum nú er at finna útav, hvat evropeiska fótbóltssamgongan stillar av krøvum kring vøllin. Annars verður dagliga trýstið á vøllin tað sama, og tað er í dag. So eftir vanligum fyritreytum bendir alt á at vøllurin heldur til trý til fimm ár, áðrenn hann noyðist at skiftast, so at hann aftur kann lúka krøvini.

HB, sum gjørdist nummar fýra í Formuladeildini í 2007, skal spæla Intertoto Cup, og teirra fyrsta dystur í fyrsta umfari verður ávikavist 21./22. og næsti dystur, 28./29. juni.

B36 tryggjaði sær við triðja plássi í Formuladeildini luttøku í UEFA Cup, har fyrsta undanumfar verður ávikavist 17. og næsti dysturin 31. juli.



*Ísak Mikladal (FSF), Heðin Mortensen (borgarstjóri) og Ásvald Simonsen, umboð fyri týsku fyritøkuna Polytan*

# Frælsur Ítróttur Føroya til Íslands

Nú um vikuskiftið fer Frælsur Ítróttur Føroya við fýra ungum rennarum til Íslands. Kappast verður á stásiligu innandurarennibreytini í Reykjavík, har størsta kappingin av sínum slagi í Íslandi – Stórmót ÍR – fer fram. Harumframt er Bjørk Herup Olsen boðin at vera við í sterkari kapping á míliini í Reykjavík International. Hetta er ein kapping, har íslendingar savna sterkar íðkarar, mest úr norðurlondum, at manna tær ymsu kappingarnar.

Hetta er aðru ferð, at FÍF er við til Stórmót ÍR. Jóan Karl Joensen, Rúni Seloy, Bjørk H. Olsen og Rebekka Fuglø umboðaðu føroysku litirnar í januar 2007 við sera góðum úrslitum:

**Jóan Karl:** Gull á 800m og 400m
**Rúni Seloy:** Silvur á 800 og 200m
**Bjørk H. Olsen:** Silvur á 800m og 400m
**Rebekka Fuglø:** Gull á 800 og bronsu á 200m

Aftur hesaferð verður farið eftir heiðursmerkjum. Føroysku luttakararnir í Reykjavík verða hesir:

**Rúni Seloy – dreingir 13-14 ár:** Leygardagin 60m og 800m. Sunnudagin 200m
**Regin Joensen – dreingir 13-14 ár:** Leygardagin 60m og 800m. Sunnudagin 200m
**Bjørk H. Olsen – kvinnur:** Leygardag 800m, Sunnudagin mílin (1.609m)
**Rebekka Fuglø – gentur 15-16:** Leygardagin 800m. Sunnudagin 400m

Ferðalagið kemur aftur mánadagin. Við á ferðini verða Guttorm Sørensen vegna FÍF og Hallur Holm, ungdómssamskipari.




*Bjørk H. Olsen*